




# Nýggj trygdarkrøv á ferjunum

**Strandfaraskip Landsins betra alsamt um trygdina umborð á føroysku ferjunum. Trygdarútgerð fyri 10 milliónir krónur verður sett umborð í ár**

TRYGD Á SJÓNUM
*Edvard Joensen*

Størru ferjurnar hjá Strandfaraskipum Landsins fáa nýggja trygdarútgerð fyri 10 milliónir krónur ísetta í ár.

Talan er um nýggja trygdarútgerð á skipum, greiðir Reidar Nónfjall, stjóri á Strandfaraskipum Landsins, frá. Útgerðin ger tað óneyðugt hjá fólki, sum skal av einum skipi, at loypa á sjógv, tá farið verður í bátin. Ofta hevur tað víst seg, at júst tað, at fólk eru vorðin køl,d hevur elvt til, at tey eisini doyggja í samband við skipsvanlukkur.

Nýggja trygdarútgerðin minnir mest um eina slisku, ella okkurt, sum næstan líkist eini hosu, greiðir Reidar Nónfjall frá. Hetta verður blást upp, og fólk glíða so niður ígjøgnum hetta rørið beinleiðis í gummibátin, sum liggur við síðuna av skipinum. Ein skipan, sum á donskum verður nevnd »Tørskoet evakuering«.

Tað er nevniliga soleiðis, at ferðafólk á einum skipi, sum rýmast skal av, skal kunna fara beinleiðis úr uppihaldsrúminum, tey eru í, og niður í bátin. Báturin veðrur fyrst settur út og drigin fram at hesi lúkuni, sum fólkið skal ígjøgnum. So verður hendan sliskan blást upp, og fólk lata seg glíða niður ígjøgnum hana. Eitt sindur av fráviki er, alt eftir støddini á skipinum.

Skipanin er umborð á Teistanum og verður í næstum sett upp umborð á Smyrli og Ternuni.

Arbeitt veðrur umborð á Smyrli, meðan hann er í sigling. Tað er ikki bara at seta sjálva útgerðina umborð. Men eisini onnur viðurskifti skulu vera í lagi, um útgeðin skal kunna brúkast til fullnar, sigur Reidar Nónfjall.

Sum dømi nevnir hann, um eitt nú eldur er í skipinum. Tá nyttar einki at seta eina slíka rýmingarútgerð upp móti eini heitari skipssíðu, tí tað smeltar hon bara burtur. Tí er neyðugt at isolerað skipið so væl, at tað ikki hendir. Millum annað tað verður gjørt umborð á Smyrli.

Reidar Nónfjall sigur, at fólk frá Strandferðsluni, teirra millum hann sjálvur, hava roynt skipanina á framsýning uttanlands. Sjálvur fór hann gjøgnum eina 13 metra høga slisku. Og tað var ikki, sum kanska væntast kundi, nakar harður stoytur, tá hann kom í bátin. Alt er tillaga so, at tað verður so lagaligt sum gjørligt hjá tí, sum brúka skal útgerðina, sigur hann.


*Ternan fær nýggja trygdarútgerð umborð, nú hon í næstu viku fer á sleipistøð*
*Mynd: Edvard Joensen*

### Altjóða krøv

Talan er um krøv, sum komin eru frá donsku sjóferðslumyndugleikunum, sum gera, at hetta veðrur sett upp nú. Upprunaliga komu krøvini frá altjóða sjóferðslustovninum IMO og eru síðan tikin upp av ymsu nationalu myndugleikunum.

Hetta, sum gjørt verður, skal gerast heilt skjótt, sigur Reidar Nónfjall. Umborð á Smyrli eru teir í gongd, og Ternan stendur fyri næsta tørninum.

Ternan fer á sleipistøð tann 19. september og verður tikin úr rutu í einar fýra vikur. Tá verður samstundis hendan nýggja útgerðin sett upp, sigur stjórin á Strandfaraskipum Landsins.

Sum vanligt er, fer gamli Sam at røkja rutuna um Vestmannasund, meðan Ternan er burtur.

## Partvís sama manning

**Hóast eitt privat felag hevur rikið Mykinesleiðina í summar, hevur skipið verið tað sama, og manningin partvís tann sama, sum tá Strandferðslan rak rutuna**

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Súlan hevur í summar siglt til Mykinesar fyri eitt privat felag. Og manningin umborð hevur partvís verið tann sama, sum tá Strandferðslan rak skipið, hóast Strandfaraskip Landsins hava latið rutuna frá sær.

Í samband við grein um Mykinesleiðina í Sosialinum í seinastu viku, hevur onkur lesari vent sær til blaðið og spurt, hvusu tað ber til, at sama skip og sama manning sum vanligt siglir til Mykinesar, hóast leiðin er latin privatmanni at reka.

Til hetta sigur Poul Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðari á Strandfaraskipum Landsins, at tað er bara partvís rætt, at so er.

Tað er rætt, at Súlan hevur siglt. Men manningin hevur bara onkuntíð verið tann sama, sum fyrr. Men alla tíðina hevur verið talan um staðkent fólk, sum neyðugt er á hasi farleiðini, leggur fólkaflutningsleiðarin dent á.

– Og tá er tað heldur ikki alla manningina, vit tosa um, sigur Poul Jákup Thomsen.

Hann sigur, at sær vitandi hevur verið talan um ein avloysara, sum fyrr hevur siglt við Súluni, og sum í eitt stutt tíðarskeið hevur verið umborð aftur í summar.

Annars hevur tað verið sera skiftandi manning, sum siglt hevur til Mykinesar í summar, sigur hann.

Og júst tað, at so ringt hevur verið at fingið fólk við Súluni, var orsøkin til, at heitt var á ein privatmann um at átaka sær siglingina.

Men tað var heldur ikki lætt at fáa nakra avtalu yvirhøvur, sigur Poul Jákup Thomsen. Júst tí, at so ringt var at fáa fólk at binda seg fyri summarið.

Hóast Poul Jákup Thomsen ikki vil koma inn á, hvat ein slík skipan hevur kostað Strandfaraskipum Landsins, kann svar hansara mestsum tulkast tann vegin, at Standferðslan hevur lagt pengar út fyri siglingina í summar.

– Tá ein slík sertænasta verður avtalaðnfyri eitt so stutt tíðarskeið, kann roknast við, at hon verður eitt sindur dýrari, enn vanliga rutan, sigur hann.

# Gøtunøvn í Hósvík

**Tað verður lættari at finna millum húsini í Hósvík um ikki so langa tíð. Tí nú fara navnaskilti at standa við vegirnar í bygdini**

KOMMUNALPOLITIKKUR

Í Hósvík fáa tey um ikki so langa tíð navnaskilti sett á gøtuhornini.

Tað er nú ikki tí, at tað er so øgiliga torført at finna í Hósvík, sigur Jógvan Mørkøre, borgarstjóri í Hósvík. Men vegir og gøtur í bygdini hava altíð havt nøvn, og hildið varð tí rætt, at seta hesi nøvnini upp alment, so øll kenna tey.

Annars eru eisini onnur viðurskifti í Hósvík, sum gjørd verða borgarunum at bata. Eitt nú verður alment nátthús liðugt nakað skjótt. Tað stendur mitt í bygdini og verður sjálvandi eisini tøkt hjá øðrum enn hósvíkingum, sigur borgarstjórin.

Talan er um ein bygning, sum Hósvíkar Kommuna og SEV hava bygt í felag. Eitt transformatortorn varð tikið niður, og ístaðin varð bygdur ein lágur bygningur beint norðan fyri ánna norðan fyri kirkjuna. Bygningurin er í tveimum, soleiðis at SEV hevur transformaran í aðrari helvtini, meðan kommuna fer at gera wc í hinari.

– Tað verður so einasta alment atkomiliga nátthúsið fram við Sundalagnum norðan fyri Kollafjørð, sum fólk í bili kunnu steðga á at nýta, um tørvur er á tí, sigur Jógvna Mørkøre.

Talan hevur verið um at gera eitt wc í kirkjuni. Men har eru ymsar umstøður, sum gera tað eitt sindur trupult, og tá nú hesin bygningurin varð bygdur at kalla fyri kirkjudurunum, er tann trupulleikin samstundis loystur, sigur borgarstjórin.

**ej**

**Landsfundur Javnaðarfloksins**
**í Vestmanna 14. og 15. september**